ítróttur

Nr. 121 • týsdagur • 29. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Nú fer ÍF av landinum

Hóast tað sunnudagin gekk av skriðuni, so hava fuglfirðingar ikki givið skarvin yvir. Eftir seinnu hálvfinaluna, sum verður leygarkvøldið, fara teir til Jyllands at fyrireika seg til seinnapartin av kappingarárinum

ÍF Á FERÐ
Jóannes Hansen

Fuglfirðingar fara í næstum av landinum á venjingarlegu í Danmark við tí fyri eyga, at teir fáa vent skeivu gongdini í landskappingini, soleiðis at teir ikki noyðist at striðast fyri at sleppa undan niðurflyting
Mynd: Álvur Haraldsen

Støðutalvan boðar frá, at tað ikki stendur nakað serligt til við fótbóltinum í Fuglafirði. Eftir 6-1 lúsingin á heimavølli í síðsta umfarinum undan summarsteðginum hevur ÍF ikki vunnið síðani í 2. leikumfari, tá ið teir á heimavølli koppaðu NSÍ við 4-2. Síðani tá hevur ÍF bara fingið stig í heimadystinum ímóti B68. Úrslitið ta ferðina var 1-1. ÍF og B68 eru á tveimum teimum niðastu plássunum, og tað er greitt at hesi bæði feløgini fara at halda summarfrí á hesum plássunum. ÍF hevur fýra stig og er sjey stig aftanfyri GÍ og átta stig aftanfyri KÍ. Um B68 fer at hava eitt ella fleiri stig varð greitt í gjárkvøldið, tá ið toftamenn spældu á heimavølli ímóti B36.

Flestu fótbóltsfeløgini eru nú farin í summarfrí. Hjá teimum flestu verður talan um steðg í umleið tvær vikur. Í annaðkvøld fer HB at taka ímóti NSÍ í Gundadali. Talan verður um síðsta dystin í nýggjunda leikumfarinum. Talan verður um rættuligt oddastrið. NSÍ, sum leygardagin tapti 4-0 á Svangaskarði í Intertoto Cup ímóti Esbjerg, sum harvið samantalt vann 7-1, fer við sigri í annaðkvøld at hava møguleika at leggja seg á odda í landskappingini. Tað hava teir, tí Skála leygardagin einki fekk burturúr heimadystinum ímóti EB/Streymi.

Um NSÍ fer at vinna á HB, so verður talan um rættuliga lítlan mun á fremstu feløgunum. Um tað harafturímóti fer at eydnast hjá HB at vinna á NSÍ, so fara meistararnir tvey tey seinastu árini rættuliga at leggja sjógv millum seg og allar hinar.

Finalistarnir

Leygardagin verður gjørt av, hvørji feløg skulu hittast í steypafinaluni á Ólavsøku. Seinnu hálvfinalurnar fara at verða spældar í Havnini og í Fuglafirði. Í Havnini fara HB, sum tað ikki enn hevur eydnast hjá at fáa lut í Løgmansteypinum, sum tað hevur verið spælt um síðani í 1999, og VB at stríðast. Fyrra hálvfinalan, sum varð spæld í Vági 23. mai, endaði 1-1.

ÍF og NSÍ fara at spæla á Varmakeldu. Dysturin er ásettur at vera leygarkvøldið klokkan 19. Tá ið hesi bæði feløgini hittust í Runavík í fyrru hálvfinaluni, endaði tað málleyst. Síðani tá hevur tað gingið støðugt framá hjá NSÍ, meðan tað hevur gingið skeiva vegin hjá ÍF.

Síðstu dystirnir undan summarsteðginum verða spældir fyrra partin av næstu viku. FCK og Todi Jónsson koma til Føroya at vitja. Teir skulu spæla í Klaksvík mánakvøldið og á Tórsvølli ímóti HB annað mikukvøld. Atgongumerki til teir báðar dystirnar eru at fáa í forsølu á Statoilstøðunum í Klaksvík, í Runavík og í Gundadali.

Fyrstu fótbóltsdystirnir eftir summarsteðgin verða spældir longu mitt í juli. Tá skulu B36 og B68 spæla í UEFA Cup. Báðir dystirnir verða ímóti letlendskum feløgum. Teir eru ásettir at vera 15. og 29. juli. Í báðum førum fall luturin fríggjadagin, at føroysku feløgini fyrst skulu spæla á útivølli. Tað verður í løtuni kanna, um tað fæst fíggjarligur fyrimunur burturúr, um annað liðið fyrst skal spæla á heimavølli. Um tað vísir seg, at hetta verður fyrimunur, so verður roynt at fáa letlendsku feløgini at býta um.

Tað verður eisini arbeitt við at flyta dystardagin í UEFA Cup frá Ólavsøkuni. Ætlanin er at fáa dystirnar avgreiddar fyri Ólavsøku.

Í innleiðandi umfarinum í kappingini fyri meistaraliið var HB so óheppið í lutakastinum, sum tað næstan bar til at ímynda sær. HB skal spæla ímóti georgiska meistaraliðnum. Luturin fall soleiðis, at HB skal spæla á utivølli mikudagin 14. juli og á heimavølli eina viku seinni.

ÍF til Jyllands

Summarsteðgurin er rættuliga stuttur hjá flestu feløgunum. Sunnudagin fór EB/-Streymur av landinum. Teir fóru til Italia, har teir í tvær vikur skulu fyrireika seg til seinnapartin av landskappingini. EB/Streymur hevur staðið seg betri higartil í ár, enn teir hava gjørt undanfarnu árini, tá ið teir hava verið í bestu deildini.

Í Fuglafirði hava teir ikki heilt mist mótið, hóast gongdin ikki hevur verið serliga hugalig nógvu tær seinastu vikurnar. Leygardagin 17. juli fer ÍF til Danmarkar á venjingarlegu. Tað eru óføru ÍF stuðlarnir, sum hava syrgt fyri, at ferðin er fingin í lag. Í ferðalagnum vera umleið 50 fólk. Umframt spælararnar vera eisini konur og børn við í ferðalagnum. Sambært snotuligi leikskránni, sum ÍF gav út í sambandi við landskappingardystin ímóti KÍ sunnudagin, so verður ferðalagið aftur í Føroyum 24. juli.

Venjingarlegan verður í Aalborg, sum er vinarbýur hjá Fuglafirði. Venjingarnar verða á vallunum hjá KFUM. Hvussu venjingarlegan fer at verða skipað valdast um, hvussu úrslitið verður ímóti NSÍ á Varmakeldustevnuni. Um ÍF fer at megna at vinna sær finaluplpáss, so fer tað nógva av venjingini at ganga fyri seg á grasi, tí finalan verður spælð á grasi á Ólavsøku.

Umframt at venja nógv so er ætlanin hjá ÍF at spæla fleiri venjingardystir á ferðini í Danmark. Enn er ikki greitt, hvørjum hesir dystirnir fara at verða spældir ímóti.

Sást ikki aftur

Sambært ÍF leikskránni so vóru ÍF spælararnir undan heimadystinum ímóti KÍ í onkrum slagi av viðger fyri at fáa sjálvsálitið upp á pláss, eftir at tað hevði gingið minni gott nógvu tær seinastu ferðirnar.

Talan var um kvøldsetu á Muntra. ÍF stuðlarnir stíldaðu fyri. Ætlanin hjá teimum var partvís at vísa spælarunum, at teir stuðlaðu teimum hundrað prosent, hóast tað ikki hevði gingið so væl. Hin parturin av ætlanini var, at dentur skuldi leggjast á, hvussu spælararnir sálarliga kundu seta seg upp og harvið hava størri møguleika at venda ikki serliga hepnu gongdini.

ÍF tapti 6-1 ímóti KÍ, og avrikið var einki at reypa av. Spurningurin er so, um tað hevði havt verið uppaftur lakari, um eingin kvøldseta hevði havt verið. Men ÍF spælararnir tykjast hava góðar karmar. Í heyst fer at bera til at staðfesta, um venjingarlegan í Aalborg fer at vera amboð at røkka málinum fyri hetta kappingarárið. Málið er at varðveita plássið í bestu deildini.

Tíggjunda umfarið í landskappingini verður á skránni sunnudagin 1. august. Tá sær skráin soleiðis út: EB/Streymur-B36, B68-KÍ, ÍF-GÍ, HB-Skála og VB-NSÍ.

Súni gjørdi bart í Vági

Landsliðsleikarin Súni Olsen var stóri leikarin, tá ið GÍ heldur óvættað vann 4-2 á VB í Vági á Jóansøku

VB-GÍ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Heldur óvættað noyddust vágbingar at lúta fyri GÍ í jóansøkudystinum í Vági leygarkvøldið. Gøtumenn fór norður aftur við einum 4-2 sigri, og landsliðsleikarin, Súni Olsen, var á blettinum heilar tríggjar ferðir.
Mynd: Áki Bertholdsen

Vágbingar hava havt eitt gott kappingarár higartil í ár, og óivað høvdu teir sett nøsina upp eftir einum sigri á Jóansøku, tá ið gøtumenn komu suður á vitjan. GÍ byrjaði kappingarárið væl, men seinastu umførini hevur tað ikki gingið eftir vild.

Avgjørdu í fyrra hálvleiki

Dysturin var ikki gamal, so var hann avgjørdur. Einans seks minuttir vóru leiktir, tá ið gestirnir úr Gøtu løgdu seg á odda. Leikandi venjarin, Krystof Popczynski. slapp leysur eftir skjótálop og staddur áraka brotsteigarmarkið, smekkaði hann til við vinstra beini, og so var 1-0 til GÍ.

Góðar tíggju minuttir seinni vóru gøtumenn aftur upp á spæl. Ein bóltur bleiv sendur væl innfyri, og við handaru stong var Krystof hægstur og stútaði upp á tvørs, har Súni Olsen var klárur og høgdi bóltin í kassan til 2-0. Landsliðsleikarin tykist trívast ógvuliga væl í sínum leikluti sum hangandi áleypari beint aftan fyri Krystof Popczynski.

Gøtumenn vóru væl betri enn vertirnir í fyrra hálvleiki, og tað var lítið, sum VB hevði at bjóða teimum mongu stevnugestunum.

Tá ið fyrri hálvleikur var um at verða liðugur fall avgerðin í dystinum, tá ið Súni Olsen enn einaferð var upp á spæl. Hann skeyt eitt av sínum vandamiklu frísparkum ímóti málinum hjá vágbingum og umvegis eitt VB-bein, smeyg bólturin sær í mál til 3-0. Sum skilst hevði bólturin allarhelst farið í mál, hóast VB-beinið ikki kom á bóltin, og dómarin í dystinum, Dagfinn Olsen, góðskrivaði landsliðsleikaran fyri málið.

At støðan var 3-0 í hálvleikinum, var ikki so nógv at siga til, tí munurin á liðunum báðum hevði verið stórur. Gøtumenn høvdu tað flótandi álopsspælið frammi, meðan vágbingar tóktust merkiliga tungir.

VB kom meiri við í dystin

Í seinna hálvleiki var eitt sindur meiri av lív í spælinum hjá heimaliðnum. Tó noyddust teir at bíða, heilt inntil eitt korter var eftir at leika av dystinum. Birgir Jørgensen, sum hesaferð byrjaði á beinkinum, var innskiftur fyri Mindaugas, og hann fekk minkað um munin fyri heimaliðið. VB royndi nú at senda nógv fólk fram í eini roynd at fáa nakað burtur úr dystinum.

Ístaðin vóru tað gestirnir úr Gøtu, sum enn einferð skoraðu. Aftur hesaferð var tað landsliðsleikarin, Súni Olsen, ið var á blettinum. Hann slapp at standa í skotstøðu áraka brotsteigarmarkið, og við sínum eyðkenda vinstrabeini sendi hann bóltin framvið Bjarna í VB-málinum, og so var 4-1 til GÍ. Vertirnir úr Vági fingu tó pyntað um úrslitið enn einaferð, tá ið Palli Augustinussen skoraði til 2-4 tveir minuttir fyri leiklok.

VB-GÍ 2-4(0-3)

0-1 Krystof Popczynski 6.
0-2 Súni Olsen 18.
0-3 Súni Olsen 45.
1-3 Birgir Jørgensen 75.
1-4 Súni Olsen 85.
2-4 Palli Augustinussen 89.

VB: Bjarni Johansen - Jón Pauli Olsen, Eyðun Jacobsen, Anders Sørensen, Jákup Olsen (65. Michael í Lágabø)- Palli Augustinussen, Milan Kuljic, Daniel Kristensen, Símun Samuelsen - Dan Djurhuus, Mindaugas (59. Birgir Jørgensen)
Gult kort: Eyðun Jacobsen
GÍ: Hallur Hansen - Leivur Hansen, Pól Ennigarð, Kaj Ennigarð, Hanus Jacobsen - Áslakkur Petersen (61. Magnus Skoralíð), Símun Louis Jacobsen, Pól Henning Jacobsen, Hans Pauli Petersen - Súni Olsen, Krystof Popczynski
Gult kort: Leivur Hansen og Pól Henning Jacobsen
Dómari: Dagfinn Olsen

STARVSLÝSING

Verkfrøðingur/Byggifrøðingur

Fyri eitt av starvsfólkum okkara á verkleiðsludeildini, sum er farið í annað starv, verður sókt eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi. Í samstarvi við aðrar deildir á stovninum varðar verkleiðsludeildin av øllum almennum byggiarbeiðum - frá prosjekteringsbyrjan til avhending og garantisýn.

Arbeiðsuppgávur
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eitt nú um:
• byggiharraráðgeving
• prosjektstýring
• byggileiðslu
• samskifti við aðalráð, ráðgevarar, arbeiðstakarar og aðrar áhugabólkar
• útbjóðing
• sáttmálar við ráðgevarar og arbeiðstakarar
• prosjektgransking

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir byggiverkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving við góðum samstarvsevnum og áhuga fyri omanfyri nevndu málsøkjum. Starvið er sera sjálvstøðugt, og gevur tær góðar møguleikar fyri at fremja tínar hugsjónir í verki. Royndir innan eitt ella fleiri av nevndu virkisøkjum gevur fyrimun, men er eingin treyt, tí roknast kann við neyðugari upplæring ta fyrstu tíðina.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftistíð, og møguleikar eru fyri eftirútbúgving. Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

Umsóknir
Umsókn við lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda í brævbjálva merktur "verkfrøðingur til verkleiðsludeildina", til:
Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn
og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 5. juli 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Kristiani Rasmussen á tel. 311 333 (e-postur: kr@lv.fo).

www.samal.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverkv.fo

LANDSVERK
byggir land